# Vegleiðing

## til umsóknarblaðið til miðnámsútbúgvingarnar 2011

| | |
|---|---|
| **Umsóknar-freist** | Tá søkt verður um upptøku á miðnámsskúla skal umsóknarblaðið fyllast út **og sendast skúlanum, ið tú hevur sum 1. ynski**. Búðstaðurin hjá skúlanum stendur á síðu 4 í hesi vegleiðingini. Á umsóknarblaðnum skalt tú raðfesta 3 útbúgvingarynski. Bert **EITT** umsóknarblað skal fyllast út. Umsóknarblaðið skal fyllast út við **SPJALDRASTAVUM.** Send **ikki** upprunaskjøl men ljóstøk, og legg øll skjøl inn í umsóknarblaðið.<br>**Umsóknarfreistin er 15. mars.** |
| **Persóns-upplýsingar** | Skriva navn, føðingardag, bústað, telefonnummar, teldupostadressu og brúkaranavn frá KT-deplinum í teigin „Persónsupplýsingar“ á síðu 1. Ljóstak av dóps- ella navnabrævi skal sendast við.<br>Teir umsøkjarar, sum hava fingið tillutað brúkaranavnið frá KT-deplinum, **skulu** skriva hetta í teigin ”Brúkaranavnið frá KT-deplinum”. Brúkaranavnið er samansett av forbókstøvum í for- og eftirnavni, føðingardegi, einum tilvildarligum bókstavi og einum tali – ólíka hjá mannfólki, líka hjá konufólki. Dømi: hj2106f9 = Hans Jacobsen føddur 21/6. |
| **Foreldur/verji** | Ert tú undir 18 ár, skal navnið á foreldrum/verja skrivast í teigin „Upplýsingar um foreldur/verja“ á síðu 1, og tey skulu skriva undir niðast á síðuni í teiginum „Undirskriftir“. |
| **Fortreytir fyri upptøku** | Tú skalt altíð útfylla teigin „Fortreyt fyri upptøku“ á síðu 1.<br>Gongur tú í 9. flokki: váttað ljóstak av seinastu støðumetum frá 9. flokki **skal** leggjast hjá.<br>Gongur tú í 10. flokki: váttað ljóstak av 9. floks prógvi og av seinastu støðumetum frá 10. flokki **skulu** leggjast hjá.<br>Hevur tú lokið 9. og/ella 10. flokk: váttað ljóstak av 9. og/ella av 10. floks prógvi **skulu** leggjast hjá.<br>Hevur tú staðið eina støðisútbúgving: søkir tú **ikki** inn á framhaldandi útbúgving á sama skúla, **skal** prógv fyri lokna støðisútbúgving leggjast hjá.<br>Hevur tú lokið miðnámsútbúgving: søkir tú inn á aðra miðnámsútbúgving, **skal** prógv fyri lokna miðnámsútbúgving leggjast hjá. |
| **Útbúgvingar-ynski** | Í teiginum „Útbúgvingarynski“ á síðu 1 skalt tú raðfesta tíni útbúgvingarynski. Allar útbúgvingarnar hava eina stytting og skúlarnir eitt tal (1-6). Styttingin fyri útbúgvingina stendur í vinstra bredda – frammanfyri heitið á síðu 2-3 í umsóknini og í hesi vegleiðingini.<br>Tú raðfestir útbúgving og skúla við at seta stytting og tal saman. Út fyri 1. ynski skrivar tú styttingina fyri útbúgvingina og talið fyri skúlan, o.s.fr. Tú skalt raðfesta 3 útbúgvingar. *Sí dømi á baksíðuni.* |
| **Stuðul** | Teigurin ”Stuðul” á síðu 1 skal altíð fyllast út. Um so er, at tú ber okkurt brek ella hevur eina sjúku, ið kunnu hava týdning fyri skúlagongdina, skalt tú at siga skúlanum frá hesum. Talan kann vera um t.d. epilepsi, asperger syndrom ella orðblindni. **Hetta hevur ikki ávirkan á upptøkuna**, men skal tryggja, at skúlin tekur neyðug atlit at skúlagongdini hjá tær. Greið nærri frá í teiginum ” Aðrar viðmerkingar” á síðu 4 í umsóknarblaðnum. |
| **Undirskriftir** | Minst til at skriva undir í teiginum „Undirskriftir“ á síðu 1. Ert tú undir 18 ár, skulu foreldur/verji eisini skriva undir. |
| **Fyrivarni** | Møguligar broytingar í undirvísingarverkinum kunnu hava ávirkan á upptøku. Fyrivarni verður tikið fyri hesum. |
| **Umsøkjarar uttanlands** | Gongur tú í 10. flokki uttanlands: váttað ljóstak av 9. floks prógvi og av seinastu støðumetum frá 10. flokki **skulu** leggjast hjá.<br>Um tú sjálv/sjálvur ert burturstødd/burturstaddur, kann annað av foreldrunum ella verji skriva undir fyri teg. |
| **Lýsing av útbúgv-ingunum** | Er ynski um at fáa at meira at vita um miðnámsútbúgvingarnar, kann ein venda sær til skúlarnar, søkt verður inn á, sí adressur o.a. á baksíðuni. |

## Upptøkukrøv til miðnámsútbúgvingarnar

| | |
|---|---|
| **FHS** | **Støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið**<br>Upptøkutreytir: Lokið fráfaringarpróvtøka fólkaskúlans (9. flokk) í føroyskum, donskum, enskum og rokning/støddfrøði við nóg góðum úrsliti ella á annan hátt hava samsvarandi kunnleikastøði.<br>Vallærugreinir: Skúlin sendir út bræv til tey, ið verða upptikin, um, hvørjar vallærugreinir verða bodnar út, og kunnar nærri um hesar. |
| **HH3** | **Hægri Handilspróvtøka 3 ár**<br>*Upptøkutreytir:* Lokið fráfaringarpróvtøka fólkaskúlans (9.flokk) við nóg góðum úrsliti. Talan er um eina samlaða 3 ára gongd, ið endar við HH próvtøku.<br>Vallærugreinir: Tú skalt velja eina av lærugreinunum: mentanarfatan C, sálarfrøði C ella týskt C (sum byrjanarmál 2 ára undirvísingargongd, sum framhaldsmál 1 ára undirvísingargongd) í sambandi við umsókn um upptøku.<br>Næmingar, ið verða tiknir upp á Føroya Handilsskúla á Kambsdali fáa skriv um, hvørjar vallæru-greinir skúlin bjóðar. |
| **HH2** | **Hægri Handilspróvtøka 2 ár**<br>*Upptøkutreytir*: Lokið FHS-støðisár við nóg góðum úrsliti.<br>Hevur tú arbeiðsroyndir, sum tú ynskir tiknar við í viðgerðini av umsóknini, skalt tú lýsa hesar í teiginum „Møguligar starvsroyndir“ á síðu 4, og annars leggja onnur viðkomandi skjøl við.<br>Vallærugreinir: hevur tú staðið støddfrøði á C-stigi ella týskt á C-stigi, skalt tú velja eina vallærugrein. Hevur tú hvørki staðið støddfrøði á C-stigi ella týskt á C-stigi, skalt tú velja tvær vallærugreinir. Hevur tú ikki staðið støddfrøði á C-stigi, **skalt** tú velja støddfrøði á C-stigi. Vallæru-greinirnar eru treytaðar av nóg stórari undirtøku. |
| **HHJ** | **Heilsuhjálpari**<br>*Upptøkutreytir*: Lokið víðkað fráfaringarpróvtøka fólkaskúlans (10. fl.) ella fráfaringarpróvtøka fólkaskúlans (9. fl.).<br>Hevur tú fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans (9. fl.), skalt tú í minsta lagi hava 1 ára útbúgving ella arbeiðsroyndir afturat 9. fl.<br>Skjalprógv fyri próvtøku og arbeiðsroyndir skal leggjast hjá. |
| **SIT1** | **Støðisútbúgving innan tøkni, 1. støðisárið**<br>*Upptøkutreytir*: Lokið fráfaringarpróvtøka fólkaskúlans (9. flokk) við nóg góðum úrsliti í lærugreinunum føroyskum, donskum, enskum og rokning/støddfrøði, umframt fylgt undirvísingini í alis-/evnafrøði. Í 1. støðisári verða hesar yrkisgreinir bodnar út:<br>Bil, EL, Gastronomi, Hárfríðkan, Metal og Timbur. |
| **SIT2** | **Støðisútbúgving innan tøkni, 2. støðisárið**<br>*Upptøkutreytir*: Lokið 1. støðisár í SIT í ávísum fakøki, hava fingið miðalpróvtalið 6 í almennum lærugreinum og hava staðið royndina í yrkislærugreinum. |
| **HT** | **Hægri Tøknipróvtøka**<br>*Upptøkutreytir*: Lokið fráfaringarpróvtøka fólkaskúlans (9. flokk) við nóg góðum úrsliti í lærugreinunum alis-/evnafrøði, donskum, enskum, føroyskum og støddfrøði. |
| **SIF/HIF** | **Støðisútbúgving og hægri próvtøka innan fiskivinnu**<br>*Upptøkutreytir*: Lokið fráfaringarpróvtøka fólkaskúlans (9. flokk) í enskum, føroyskum og støddfrøði við nóg góðum úrsliti. |

| | |
|---|---|
| **HF** | **Hægri fyrireikingarpróvtøka**<br><br>HF-útbúgving fæst í 3 støðum: á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy (á Kambsdali og í Klaksvík) og á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði (Tórshavn).<br><br>Næmingaøkið hjá Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy er Norðoyggjar, Eysturoy og tann parturin av Streymoynni, ið fevnir um Sunda kommunu. Býrt tú í hesum næmingaøki, skalt tú velja annaðhvørt HF-skeiðið á Kambsdali ella í Klaksvík.<br><br>*Upptøkutreytir*: Lokið víðkaðu fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans í donskum og føroyskum. Harumframt skalt tú hava lokið fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans í enskum og støddfrøði. Tað er ikki neyðugt, at tú hevur havt týskt, men hevur tú fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans í týskum, verða valmøguleikarnir hjá tær størri. Fyri at verða tikin upp til HF, skalt tú hava fylt 18 ár í seinasta lagi 31. desember í tí ári, tú byrjar í 1. HF.<br><br>HF-skeiðið, ið tú hevur søkt inn á, innkallar teg til samrøðu, so at HF-skeiðið kann tosa við teg um títt fakliga støði og títt endamál við at søkja inn á HF.<br><br>Lýkur tú ikki beinleiðis ásettu upptøkukrøvini, hevur rektarin/skeiðsleiðarin kortini møguleika at taka teg upp, um hann heldur, at títt fakliga støði er í lagi, og at tú kanst taka prógv til ásetta tíð.<br><br>*Annað*: Lærugreinir, sum tú skalt velja ímillum í sambandi við upptøku: Á umsóknarblaðnum í teiginum „HF-útbúgving“ á síðu 3 skalt tú velja 2 av hesum lærugreinum: alisfrøði-evnafrøði, lívfrøði ella samfelagsfrøði. Tær 2 lærugreinirnar, tú velur, fært tú í 1. HF.<br><br>Lærugreinir, sum tú skalt velja ímillum í sambandi við upptøku: Hevur tú fráfaringarpróvtøku fólka-skúlans í týskum, kanst tú velja millum týskt sum framhaldsmál, ella millum franskt og spanskt sum byrjanarmál. Hevur tú ikki fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans í týskum, skalt tú velja millum franskt, spanskt ella týskt sum byrjanarmál.<br><br>Tú skalt eisini velja eina av lærugreinunum: tónleik, ítrótt og evning*).<br><br>Umsøkjarar til HF skulu venda sær til lestrarvegleiðingina á tí HF-skeiði, sum ætlanin er at søkja inn á, fyri m.a. at fáa nærri upplýsingar um vallærugreinir.<br><br>*) Tað er bert á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, at til ber at velja evning. |
| **STm/STs** | **Student**<br><br>Studentaskúlaútbúgving er á 3 støðum: á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, Miðnámsskúlanum í Suðuroy og Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoynni. Um tú ynskir studentaskúla-útbúgving og býrt í Norðoyggjum, Eysturoy ella tí parti av Streymoynni, ið fevnir um Sunda kommunu, skalt tú sambært lógini velja Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy. Landsstýris-maðurin í undirvísingarmálum kann, um serlig viðurskifti gera seg galdandi, býta næmingar millum studentaskúlarnar. |
| **STm** | **Málslig deild**<br><br>Upptøkutreytir: Tú skalt hava staðið fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans (9. flokk) við nóg góðum úrsliti í donskum, enskum, føroyskum, rokning/støddfrøði og týskum.<br><br>Lærugreinir, sum tú skalt velja ímillum áðrenn upptøku: Á umsóknarblaðnum í teiginum „Student“ á síðu 3 skalt tú skriva, um tú vilt hava franskt ella spanskt sum byrjanarmál. |
| **STs** | **Støddfrøðilig deild**<br><br>*Upptøkutreytir*: Tú skalt hava staðið fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans (9. flokk) við nóg góðum úrsliti í alis-/evnafrøði, donskum, enskum, føroyskum og rokning/støddfrøði.<br><br>Tú skalt velja ímillum nakrar lærugreinir í sambandi við upptøku: Hevur tú fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans í týskum, kanst tú velja millum týskt sum framhaldsmál, ella millum franskt og spanskt sum byrjanarmál. Hevur tú ikki fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans í týskum, skalt tú velja millum franskt, spanskt ella týskt sum byrjanarmál.<br><br>*) Tað er bert á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, at til ber at velja evning. |

## Upptøkukrøv til miðnámsútbúgvingarnar

### Raðfesting av útbúgvingarynskjum

| Útbúgving og stað | | Stytting | |
|---|---|---|---|
| FHS | Tórshavn<br>Kambsdalur | FHS<br>FHS | 1<br>2 |
| HH3 | Tórshavn<br>Kambsdalur | HH3<br>HH3 | 1<br>2 |
| HH2 | Tórshavn<br>Kambsdalur | HH2<br>HH2 | 1<br>2 |
| SIT1 | Tórshavn<br>Klaksvík | SIT1<br>SIT1 | 1<br>3 |
| SIT2 | Tórshavn<br>Klaksvík | SIT2<br>SIT2 | 1<br>3 |
| HT | Klaksvík | HT | 3 |
| SIF | Vestmanna | SIF | 5 |
| HIF | Vestmanna | HIF | 5 |
| HF | Tórshavn<br>Kambsdalur<br>Klaksvík | HF<br>HF<br>HF | 1<br>2<br>3 |
| STm | Tórshavn<br>Kambsdalur<br>Porkeri | STM<br>STM<br>STM | 1<br>2<br>4 |
| STs | Tórshavn<br>Kambsdalur<br>Porkeri | STS<br>STS<br>STS | 1<br>2<br>4 |
| HHJ | Porkeri | HJ | 6 |

***Dømi:***
Fyrsta ynskið er Støðisútbúgving innan fiskivinnu í Vestmanna, annað ynskið er FHS á Kambsdali, og triðja ynskið er HF í Tórshavn.

Aftaná 1. ynski skrivar tú „SIF“ og ”5”
Aftaná 2. ynski skrivar tú „FHS” og ”2”
Aftaná 3. ynski skrivar tú „HF“ og ”1”

Verður tú ikki tikin upp eftir fyrsta útbúgvingarynski, sendir skúlin umsóknina víðari til næsta ynski á umsóknarblaðnum o.s.fr.

| Ynski | Útbúgving | Stað |
|---|---|---|
| 1. ynski | SIF | 5 |
| 2. ynski | FHS | 2 |
| 3. ynski | HF | 1 |

### Adressur o.a. hjá skúlunum og lestrarvegleiðingunum

| | | |
|---|---|---|
| **Tekniski Skúlin í Klaksvík** | Heygavegur 1A<br>Postrúm 20<br>710 Klaksvík | Skúlin: tlf. 456311<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 456311, lok. 21<br>Heimasíða: www.tsk.fo |
| **Tekniski Skúlin í Tórshavn** | Smiðjugerði 1<br>Postrúm 3239<br>110 Tórshavn | Skúlin: tlf. 738050<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 568060<br>Heimasíða: www.tst.fo |
| **Føroya Handilsskúli í Tórshavn** | Marknagilsvegur 77<br>Postrúm 177<br>110 Tórshavn | Skúlin: tlf. 317177<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 317141, lok. 22<br>Heimasíða: www.fh.fo |
| **Føroya Handilsskúli á Kambsdali** | Dalsvegur 1<br>Kambsdalur<br>530 Fuglafjørður | Skúlin: tlf. 610900<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 610903<br>Heimasíða: www.fhk.fo |
| **Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy** | Kambsdalur<br>530 Fuglafjørður | Skúlin: tlf. 610800<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 610800<br>Heimasíða: www.shey.fo |
| **Føroya Studentaskúli og HF-skeið** | Sanatoriivegur 1<br>188 Hoyvík | Skúlin: tlf. 360660<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 360675-360678<br>Heimasíða: www.hoydalar.fo |
| **Fiskivinnuskúlin í Vestmanna** | Fjarðarvegur 4<br>350 Vestmanna | Skúlin: tlf. 424573<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 424573<br>Heimasíða: www.fiskvest.fo |
| **Miðnámsskúlin í Suðuroy** | Grønudalur 2<br>950 Porkeri | Skúlin: tlf. 614201<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 224011<br>Heimasíða: www.midnam.fo |
| **Klaksvíkar HF-skeið** | Klaksvíksvegur 60<br>700 Klaksvík | Skúlin: tlf. 456412<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 456412<br>Heimasíða: www.shey.fo |
| **Heilsuskúli Føroya** | Grønudalur 2<br>950 Porkeri | Skúlin: tlf. 614210<br>Lestrarvegleiðingin: tlf. 614210<br>Heimasíða: www.heilsuskulin.fo |